Hetta síðsta slapp eg at royna, tá vit fóru á eitt “kosher pizzaria”. Alt sá púra normalt út, einasti munurin var menuin. Á henni vóru 20 ymisk sløg av pizza, har allar høvdu til felags, at onki kjøt var á teimum. Tað er nevniliga ikki loyvt at blanda kjøt og mjólkaúrdráttir so sum ost saman. Eg mátti flenna, tá eygað datt á “vegetarian pizza”, tí allar vóru vegetariskar, tó var ein tun-pizza. Vælkenda skinku-ananas pizzain, Hawaii, var eisini á menu’ini, men bara uttan skinku. At eta í einum “kosher pizzaria” var eitt stuttligt upplivilsi, og pizza’in smakkaði eisini fínt.



*Inni í synagogu*

## Ongin hjúnarskilnaður

Hvussu nógvum trupulleikum og sorgarleikum hevði man ikki sloppið undan, um orð sum “hjúnarskilnaður” og “ótrúskapur” høvdu verið eins sjáldsom sum lundi á jólanátt? Sambært David eru hesir trupulleikarnir minimalir millum ortodoksar jødar. Spurdur um orsøkina, svaraði hann: “Sum eg segði í áðni, so eru jødar sera sjálvdisiplineraðir”.

Hann fór so at greiða frá, hvussu teirra, í okkara eygum, stranga kærleiksskipanin virkar: “Tað er einki, sum eitur at flirta í ótíð. Vit fara á eina date, stevnimøti, við eina gentu, og so má metast frá tí. Følir man, at hetta er ein møguleiki verdur at royna, so kann avtala gerast at møtast aftur. Um tað ikki spyrst nakað burturúr, hendur ikki meira. Tá er tað einki, sum eitur at skriva hvørjum øðrum sms ella nakað líknandi. David greiðir framhaldandi frá: “Sum oftast eru tað familjurnar hjá okkum, sum viðmæla hvør, ið skal hittast. So spyrja tey meg og gentuna, um vit hava hug til at møtast. Tað verður so antin ja ella nei.”



*Inni í London funnu vit eina ískafe, sum hevði kosher-stemplið*

“Vanliga verður man forlovaður eftir einar tríggjar ella fýra dates. Forlovingin er millum fýra og seks mánaðir, áðrenn man gongur saman í hjúnarlag.”

Enn er einki spurt burtur úr hjá David, men hann er nú farin at nýta tøknina, har hann er farin at brúka ta populeru internetsíðuna “Facebook”, har hann sjálvur kann møta gentum, sum hann møguliga kundi farið á date við.

## Don’t touch

Eg gjørdist púra ovfarin, tá ið hann greiddi frá, hvussu strang forlovilsistíðin var. Eitt nú er tað ikki loyvt so mikið sum at nema gentuna áðrenn hjúnarlag. Heldur ikki at halda í hondina á henni. Fyrsta fysiska kontakt er, tá ið brúðgommurin setir ringin á fingurin á brúðrini.

Líka so flott sum síðstnevnda myndin er, líka ófatiligt er tað, at eitt nýforelskað par klárar ikki so mikið sum at leiðast í upp til eitt hálvt ár. Hetta er ikki júst tað, sum vit her heima kenna til!

Tá eg spurdi David, um tað kanska ikki var eitt sindur keðiligt og torført, at reglurnar eru so strangar á hasum økinum, vísti hann aftur á, at hjúnarskilnaður ella ótrúskapur er nærum ókent. “Eg trúgvi, at vit bara hava eitt sindur meira sjálvdisiplin enn onnur”.

Onkur kritiskur lesari heldur so kanska, at hetta kann sammetast við tvingsilshjúnarløg, men sum David sigur skemtandi: “Eg havi javnan verið á eini nýggjari date nú í nøkur ár”, og sigur hann víðari “jødum dáma ikki at tosa ringt um onnur, men tá tað kemur til at eftirmeta eina date saman við tey nærmastu, verður einki spart, tí hetta er ein somikið týdningarmikil avgerð.” Her verður ikki farið fram eftir fummum.

## Biðja allan dagin

Eg mann vera ein av teimum fáu føroyingunum, sum hevur fingið møguleikan at uppliva eina synagogu ‘in action’.

Tríggjar ferðir um dagin skulu jødarnir í eina synagogu, har teir skulu biðja sínar bønir: um morgunin áðrenn morgunmat, mitt á degi og so um kvøldið, áðrenn teir fara í song. Haraftrat biðja teir við onnur høvi, eitt nú eftir máltíðir. Hetta er ein blandingur av niðurskrivaðum bønum, sum verða messaðar og persónligum bønum. Sabbaturin er jødiskur heiligdagur, og tá fer allur dagurin til bøn og lesna. Tá er strangliga bannað at gera nakað sum helst arbeiði. Ikki so frægt sum at tendra eina kontakt er loyvt.

Tað var eitt heilt serligt upplivilsi hjá mær at vera millum allar hesar jødarnar í synagoguni. Bara menn vóru inni í hølinum, og vit høvdu allir okkurt á høvdinum. Sjálvur hevði eg lánt ein kalot frá beiggja David. Eg skilti ikki eitt orð av tí, sum var sagt, tí alt gekk fyri seg á hebraiskum. Í einar fimtan minuttir stóðu vit og messaðu, mediteraðu og bóðu. Fyri meg ljóðaði tað eitt sindur sum eitt pinsamøti, tá øll biðja í tungum, og man ikki skilir eitt orð. Eg stóð so har sum ein dunna millum hønurnar, har eg á besta hátt royndi at gera, sum hinir gjørdu.

Nøkur eygu fekk man tó vend móti sær, ein ungur skandinavi við ljósum holdi og T-shirt við printi á bringuni millum skeggjutar hebraiskt messandi jødar í svørtum jakkum og hvítum skjúrtum.

Eitt stuttligt dømi um teirra trúfesti mótvegis bønarmentanini var, tá David og eg fóru til musical um kvøldið. Mitt í sýningini fór hann út, og var hann burtur í einar tíggju minuttir. Tá skilti eg, at hann hevði orðnað kvøldbønina hjá sær.



*Óli Jákup klárur til at seta tenninar í sína fyrstu kosher-pizza*

## Eg elski Føroyar

David tekur í ‘den dur’ undir við kórinum hjá Sjúrði Skaale “E elski Førjar”. Spurdur um framtíðarætlanir svaraði hann: “Næsta ár skal eg í praktik í tveir mánaðir. Eg vóni, at tað fer at bera til hjá mær at arbeiða á sjúkrahúsi í Føroyum ta tíðina”. Tað er eingin ivi, at hansara kenslur fyri Føroyum eru veruligar, og sigur hann eisini: “Eg skilji als ikki, hví føroyingar duga so illa at virðismeta teirra land. Føroyar eru fantastiskar.” Men sum skilst, so er tað ikki bara sum at siga tað hjá einum jøða at ferðast higar. Hann er noyddur til at taka allan matin við heimani frá og at halda sabbatin heilagan einsamallur.

Men har tað er vilji, er eisini ein vegur. Væntandi verður hetta heldur ikki síðstu ferð David fer at leggja leiðina fram við 62° norður. Hann skal eisini vera meira enn hjartaliga vælkomin.